Ljósini tendrað:

# Æðuvík í jólahýri

**Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði, helt røðu og hornorkestur spældi, tá ið ljósini í Æðuvík alment vórðu tendrað í regni og vindi sunnukvøldið**



*Hornorkestrið setti sín serstaka dám á við sínum tónleiki*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Tað var Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði, sum helt røðuna*

Mynd: Vilmund Jacobsen

JÓLAHÝRUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Hóast veðrið var vánaligt við regni og vindi høvdu nógv fólk leitað sær til Æðuvíkar sunnukvøldið, tá ið tey mongu og vøkru ljósini í "jólabygdini" alment vórðu tendrað.

Hetta er triðja árið á rað, at æðuvíkingar gera nógv burtur úr at pynta bygdina til jóla – og hvørt ár hava tey gjørt meira og meira burtur úr.

Hvørt hús er pyntað við ljósum – tey flestu heilt úr túninum og upp í skjøldurin.

Tað skerst ikki burtur, at Æðuvík í jólamánaðinum er nakað heilt fyri seg – til gleði fyri bæði børn og vaksin, sum búgva á staðnum og fyri tey mongu, sum leita á hesar leiðir.

Og tey eru mong, sum koyra sær ein túr til Æðuvíkar um kvøldarnar hesa tíðina av árinum.

Tað var borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, sum beyð vælkomin.

Eitt væl mannað hornorkestur við bæði børnum og vaksnum setti sín serstaka dám á løtuna.

Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfjarðar kommunu, helt røðu, sum fall væl í oyruni hjá teimum, sum komin vóru at lýða á og síggja væl pyntaðu bygdina.

Eftir røðu og hornatónleik, sum framborin vórðu undir vánaligum veðurlíkindum, bjóðaðu æðuvíkingar holukøkur og gløgg.

Hetta er fyrstu ferð, at æðuvíkingar hava skipað fyri almennum tiltaki, har ljósini í bygdini verða tendrað.

Tiltakið vardi umleið ein tíma og eydnaðist stak væl.



*Við minnisvarðan stóð krubban við Jesusbarninum, Mariu og Jósefi*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Eftir sjálvt haldið, fingu fólk holukøkur, gløgg og sodavatn, sum kom væl við í vánaliga veðrinum*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, beyð vælkomin*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Samanhald skapar jólabygdina

**Tað vóru bindiklubbakonurnar í Æðuvík, sum fingu hugskotið at gera serliga nógv burtur úr bygdini sum jólabygd. – Hetta var eftir, at Æðuvík varð kosin at vera best røkta bygd í 2001, sigur Sólrun Johannesen**

JÓLAHÝRUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Sólrun Johannesen í Æðuvík sigur, at hugskotið at gera so nógv burtur úr bygdini í jólamánaðinum er sprottið úr práti millum bindiklubbakonur í Æðuvík.

– Flestu konur í bygdini eru við í bindiklubbanum, og eftir at bygdin í 2001 varð kosin at vera best røkta bygd í Føroyum, fóru vit at tosa um, hvat vit annars kundu finna uppá. Í Æðuvík er ógvuliga gott samanhald og ein slíkur heiður, sum at vera kosin til best røktu bygd, skapar enn størri samanhald.

Hon sigur, at tá ið hugskotið um at gera serliga nógv burtur úr at pynta bygdina til jólar, kom upp at venda, tóku fólk beinanvegin undir við hesum.

– Vit tosaðu saman, eisini við tey, sum ikki eru knýtt at bindiklubbanum, og øll vóru samd um at gera nakað við hetta.

Sólrun sigur, at øll bygdin stendur saman um at pynta til jólar, og tað er líkasum, at hvør roynir at gera meira enn annar.

– Tað eru trý ár síðan, at vit fóru undir hetta tiltak, og á hvørjum ári er bygdin vorðin pyntað meira og meira. Í ár hava fleiri keypt sær ymiskar lýsandi "figurar", sum settir eru upp á húsaveggirnar. Hini árini hava hesir í størri mun verið heimagjørdir. Keyptu "figurarnir" eru vakrari, og teir pynta nógv um - aftrat øllum tí, sum vit frammanundan hava í vindeygunum og uppi á húsunum.

Hon sigur, at hópur av fólki úr ymiskum heraðshornum vitja bygdina í jólamánaðinum.

– Men hetta hevur ikki verið nakar trupulleiki, tí Æðuvík liggur við endan av vegnum – og við ongari gjøgnumkoyring, ið kann elva til trupulleikar, sigur Sólrun.

Sólrun sigur, at tá ið tey fingu hugskotið at pynta bygdina til jólar, hugsaðu tey, at Æðuvík er ein passaliga lítil og avmarkað bygd til eitt slíkt tiltak.

– Eg vil siga, at serliga børnini eru púra "vekk" í øllum hesum, og hetta er sjálvsagt eisini til miklan hugna og stóra gleði fyri okkum vaksnu, sigur Sólrun Johannesen at enda.

Hvørt einstakt húski í Æðuvík ber kostnaðin av tí, tey gera, men øll bygdin stendur saman um Jesusbarnið, Mariu og Jósef, sum standa og lýsa við minnisvarðan.